# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*e-postur: anna@sosialurin.fo*

## Skammaradóttirin gerast til film



*Bøkurnar um Skammaragentuna hava gjørt høvundan Lene Kaaberbøl heimskenda*

Bøkurnar um Skammaradóttrina eru væl umtóktar. So væl umtóktar, at tær kappast um lesararnar á jøvnum føti við bøkurnar um Harry Potter - í øllum førum í Danmark. Eisini filmsframleiðarar úr nógvum londum - harav fleiri úr Hollywood - hava kappbjóðað um at fáa rættindini til at gera bøkurnar til film. Tá ið avtornaði vann Nordisk Film, og tað fegnast høvundurin um.

– Tað er sjálvandi hugaligt, at so nógv filmsfeløg bjóða seg fram, men eg eri sera glað fyri, at tað gjørdist Nordisk Film. Tað gevur mær høvi at fylgja væl við, meðan upptøkurnar fara fram, sigur Lene Kaaberbøl, sum hevur vunnið fleiri virðislønir fyri bókarrøðina.

Nær farið verður undir upptøkurnar er enn óvist. Bøkurnar eru um gentuna Dinu og familju hennara. Dina hevur arvað skammaraevnini frá mammu síni, og av tí standast nógvar truplar og eisini vandamiklar støður. Bøkurnar, sum eru væl egnaðar til tey 10-14 ára gomlu, eru komnar út á nógvum málum, eisini á føroyskum, *Dóttir Skammarans* og *Skammarateknið* og í hesum døgum kemur triðja bókin í røðini *Ormsins gáva*. Seinni í ár kemur fjórða og síðsta bókin, *Skammarakríggið*. Tað er Karl N. Hansen, ið nú týðir bøkurnar, og Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur tær út.

**tk**




# Ungir høvundar hittust

Tað ljóðaði lovandi, tá fýra av okkara yngru høvundum lósu upp úr komandi útgávum á Mentanarnáttini seinasta fríggjadag



*Seinni í ár fer sjónleikarin Bárður Persson væntandi at royna seg sum rithøvund fyri fyrstu ferð*

### Stillføri og marrudreymar

Sigrið Gaini hevið valt at lesa styttri yrkingar úr sínum trimum yrkingasøvnum *Soflúgv, Orð og andlit* og *2002 nætur*. Fyrsta savnið hjá Sigrið kom út í 1997, og í fjør gjørdi hon rættiliga vart við seg, tá hon vann M.A. Jacobsens virðisløn fyri fagrar bókmentir fyri savnið *2002 nætur.* Í grundgevingini vísti nevndin á kensluliga huglagið í yrkingunum hjá Sigrið, har stillføri við kílum av harðligum myndum skapa eina heilt serliga rødd í føroyskum skaldskapi.
Hóast unga aldurin, er Marjun Kjelnæs ein royndur høvundur eftirhondini. Hon hevur vunnið fleiri stuttsøgukappingar, og lesarar tóku væl ímóti hennara fyrstu og higatil einastu útgávu *Ein farri av kolvetni*, sum kom út síðsta ár. Á Mentanarnáttini hevði Marjun tó valt at lesa brot úr eini stuttsøgu, hon enn ikki er heilt liðug við. Í søguni vaknar Timotus Thomsen úr einum marrudreymi um abba sín, sum samlar skotvápn. Hesir báðir hava eitt heilt serligt samband við hvønnannan, sum ikki bara er hugnaligt. Hvussu søgan endar, máttu árhoyrarnir fyribils gita seg til. Men eftir tí, vit hoyrdu, er Marjun Kjelnæs í ferð við at troyta nýggjar møguleikar í síni skriving.

### Messias og flugan

Petur Elias Askham er á veg við síni fyrstu skaldsøgu, sum ætlandi kemur út í heyst. Skaldsøgan hevur fingið heitið *Messias II* og snýr seg um Adam, sum líður av stórlæti og einum messiaskompleksi, sum Petur tók til. Og brotið, hann hevði valt at lesa, avdúkaði, at Adam dámar væl at brúka stór orð. Í samrøðuni millum hann og gamla Gabriel fuku banniorðini um oyruni á áhoyrarnum á ein hátt, vit ikki eru serliga von við á føroyskum, men sum uttan iva hóska høvuðspersóninum væl.

Seinasti høvundurin, sum las upp, var eisini tann einasti, sum ikki hevur givið nakað út enn. Men forsmakkurin, áhoyrarnir fingu hendan dagin, var lovandi - ikki minst tá Bárður Persson las yrkingina "Maðurin og flugan", ein fyndug lýsing av einsamalla manninum, sum tekur eina flugu á eini café við sær til hús fyri at - ja, møguliga fyri ikki at kenna seg so einsamallan.

Við einum smíli takkaði Bárður Persson fyri at verða umtalaður sum høvundur, og vónaði, at hann hevði uppiborið heiðurin. Tað fáa lesarar høvi at meta um seinni í ár, tá Bárður væntar at geva sítt fyrsta savn av prosakendum yrkingum út.

Nýútgáva:

## Lucas Debes á týskum

Herfyri kom ein nýggj útgáva av gomlu týsku týðingini av Lucas Debesar bók um Føroyar. Tað er Norbert B. Vogt, limur í blaðstjórnini hjá týska blaðnum Tjaldur, sum hevur greitt nýútgávuna til prentingar. Tjaldur er blaðið hjá týska/føroyska vinafelagnum við sama navni, og er tað eisini einasta útlendska blað av hesum slag, sum viðger føroysk viðurskifti.

Lucas Debesar bók um Føroyar kom út fyrstu ferð í 1673, og er hon seinni umsett til bæði enskt og týskt. Í bókini lýsir danski presturin Lucas Jacobsen Debes føroyska náttúru, søgu, politikk, pátrúgv, fólkið o.a.

Nýútgávan er ein vísundalig útgáva av fyrru týsku útgávuni frá 1757, við viðmerkingum og eftirmæli eftir Norbert B. Vogt.



*Lucas Jacobsen Debes, Natürliche und Politische Historie der Inseln Färöe (Kopenhagen/Leipzig 1757), Mülheim a.d. Ruhr, 2005*

Nýtt frá BFL:

## Fantasy á føroyskum

Kápan á bókini *Stravaganza Grímubýurin* eftir Mary Hoffmann boðar frá, at hetta er ein serlig bók. Á kápuni er ein glitrandi gríma, og undir kápuni hómast ein sera væl kendur málningur av gondolum í Venezia.

Søgan fer fram í javnfjarum verðum, hetta er vanligt í slíkum fantasybókum.

Í søguni ferðast Lucien aftur og fram ímillum sína egnu verð, sum er í London á okkara døgum, og Talia, sum er ein verð í 16. øld. Talia er bæði lík og ólík tí Italia, sum vit kenna. Munurin er tann, at Talia gjørdist ein sjálvstøðug verð eftir bardagan millum Romulus og Remus. Í Italia vann Romulus sum kunnugt stríðið og grundaði Rom, í Talia vann Remus og grundaði Remora, høvuðsstaðin í remanska ríkinum.

*Grímubýurin* er ein tølandi frásøga um Lucien úr Englandi og Arionnu úr Talia, um hertogafrúuna í Belezza og vin hennara, tann duldarfulla Rodolfo, sum verður tann, sum hjálpir Lucien at taka eina avgerð um at liva ella at doyggja í Belezza ella í London.

Hetta er fyribils fyrsta bók í einari røð av Stravaganzabókum.

Jón Joensen hevur týtt úr enskum, bókin er 332 blaðs., heft við klaffum og kostar 195 kr í bókabúðum. Hon er hóskandi at lesa hjá 13 ára gomlum og eldri.




**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent
FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo